

## Afghanar til Danmarkar

Í Danmark hevur Reyði Krossur gjørt av at útbyggja móttøkustøðini, tí altsamt fleiri flóttafólk úr Afghanistan koma til Danmarkar. Í fjør søktu 418 afghanar um uppihaldsloyvi í Danmark ella tríggjar ferðir fleiri enn í 2007, og tað merkir, at nú koma næstan líka nógvir afghanar til Danmarkar sum irakar. Jørgen Chemnitz hjá danska Reyða Krossi sigur við kringvarpið DR, at nú koma umleið 60 flóttafólk til Danmarkar um vikuna, og at tey flrestu koma úr Afghanistan. Rættiliga stórur partur eru børn og ung, sigur hann.

## Loyva boring við koralriv

Norska olju- og orkumálaráðið hevur gjørt av at loyva oljuleiting við Sularivið, sum er eitt tað størsta djúpvatnskoralrivið í heiminum. Norska kringvarpið NRK sigur, at norsku havgranskararnir eru ikki fegnir um avgerðina. Ein teirra, Jan Helge Fosså, vísir á, at eftir boðum frá fiskimálaráðnum sleppa trolarar ikki at royna í økinum, men kortini hevur einki orðaskifti verið um ætlanina at lata økið upp fyri oljuleiting, sigur hann. Sularivið er átta fjórðingar langt, upp til 35 metrar høgt og ein lítlan hálvfjórðing breitt. Dýpið er um 160 favnar.

# Faroe Ship steðgar frískum vikuskiftisgrønmeti

**Faroe Ship hevur avgjørt at leggja niður flutningin av frukt og grønt úr Århus týsdag, sum hevur givið føroysku matvøruhandlunum fríska vøru til vikuskiftið**

FRUKT OG GRØNT

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í farnu viku kunngjørdi Faroe Ship broytingar í siglingarkervinum. Siglingarkervið er útbygt til at fevna um tríggjar leiðir við fimm skipum hjá Faroe Ship. Millum annað hevur Faroe Ship gjørt avtalur við Maersk og Containership um flutning til mið- og fjareystur, Suður Amerika, Russland og baltisku londini v.m. Føroyaleiðin siglir beinleiðis úr Føroyum til Danmarkar mikudag, Suðurleiðin siglir beinleiðis til Bretlands fríggjadag, og Norðurleiðin siglir beinleiðis til Evropa leygardag, og leggur tá at í Rotterdam. Innflutningur frá øllum Evropa kemur við Føroyaleiðini, og Norðurleiðini til Føroya í vikuskiftinum. Sagt verður í tíðindaskrivinum, at nýggja siglingarætlanin ger, at Faroe Ship nú kann bjóða allar loysnir innan bingjuflutning.

Men broytingarnar hava eisini við sær, at eini túrurin hjá Bliki úr Århus verður strikaður.

- Vit eru givin við túrinum hjá Bliki úr Århus týsdag, og harvið flutninginum av frukt og grønmeti úr Århus, sigur Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship.

- Vit hava roynt innflutningin av frukt og grønmeti tvær ferðir um vikuna í umleið eitt hálvt ár, men tað vísir seg at mongdirnar eru ov lítlar til at tað ber seg, sigur stjórin í Faroe Ship.

Í staðin hevur Faroe Ship valt at fokusera upp á at fáa feskan fisk og laks av landinum mikudag og fríggjadag, og síðan at hava fríska vøru í handlunum mándag.



*Broytingar í flutningskervinum hjá Faroe Ship hava við sær, at vikuskiftisgrønmeti- og fruktin verður av ongum. Størstu innflytarnir harmast avgerðina, tí vikuskiftisgrønmetið hevur verið væl móttikið av viðskiftafólkunum.*
*Savnsmynd*

## - Vit verða bumbað 20 ár aftur eftir

**Niels Mortensen, stjóri í Miklagarði, heldur avgerðina um at spara burtur ta einu frukt- og grøntleiðina hjá Faroe Ship, vera sera keðiliga. Mann verður bumbaður 20 ár aftur eftir, heldur hann**

FRUKT OG GRØNT

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Hetta er triðju ferð tey hava roynt at flyta inn frukt og grønt tvær ferðir um vikuna, mann hevur lagt nógva orku í at fáa tað at rigga, og so verður mann bara bumbaður 20 ár aftur í tíðina. Bæði vit og okkara kundar, sigur Niels Mortensen, stjóri.

Niels Mortensen er sera harmur um avgerðina hjá Faroe Ship. Viðskiftafólkini hjá Miklagarði hava verið glað fyri at fáa fríska frukt og frískt grønmeti tvær ferðir um vikuna, og bert at fáa frukt og grønt eina ferð um vikuna, er ov vánaligt, heldur hann.

Sum heild heldur stjórin í Miklagarði lítið um flutningsmøguleikarnar í Føroyum. Til dømis kundi hann hugsað sær at fingið vøruna flutta loftvegis, og hevði ynskt at Atlantic Airwys tók initiativ til at flyta vøru.

- Hetta eru vit absolutt ikki glað fyri. Eg sakni aðrar møguleikar á økinum, og vóni at flogfelagið tekur initiativ til at flyta vøru í staðin, sigur Niels Mortensen.

## Fara at sakna vikuskiftisfruktina

**Í FK í Hoyvík hava tey verið glað fyri at fáa fríska vøru inn á frukt- og grønt deildina til vikuskiftið. Tey fara at sakna frukt og grønt til vikuskiftið**

FRUKT OG GRØNT

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Hetta hálva árið, Faroe Ship hevur flutt inn frukt og grønt til landið tvær ferðir um vikuna, hevur verið gott fyri størsta innflytaran av frukt og grønmeti, nevniliga FK við øllum sínum deildum, og teirra viðskiftafólk.

- Vit fara at sakna at fáa frískt grønt og fríska frukt til vikuskiftið. Alt hevur verið ordiliga lekkurt, og mann manglar ongantíð nakað, og vit hava merkt, at viðskiftafólkini hava verið glað fyri møguleikan, sigur Hanna Bisp, starvsfólk í FK í Hoyvík.

Tíðindini um niðurleggingina av tí eina túrinum hjá Faroe Ship, ið flytir frískt grønmeti og fríska frukt til landið, so føroyingar fáa góðar vørur til vikuskiftið, bórust fríggjamorgunin. Í FK eru tey ikki í iva um at viðskiftafólkini fara at harmast um ikki at fáa fríska frukt og grønmeti til vikuskiftið.